VALGREINAR

Eldraøkið

Haldóra Ranghamar
valevni hjá Sambandsflokkinum í Eysturoy

Eldraøkið verður tikið fram til hvørt val - lyfti, sum ikki blíva til veruleika.

Tørvurin eftir mannsømuligum korum hjá okkara eldra ættarliði er rættuliga stórur.

Hóast stóran búskaparvøkstur tey síðstu árini, hevur ov lítil áhugi verið sýndur teimum eldru. Nationalistiskar hugsjónir er komnar í fremstu rød.

Hóast eldraøkið er ein landsuppgáva, so hava fleiri kommunur sæð seg noyddar sjálvar at gera nakað við hesar umstøður og hava so tikið stig til at bygt sambýlir.

Avvarðandi eru mangan í dýrastu neyð, royna eftir besta førimuni at hjálpa, eru noydd í ávísum førum at fara úr arbeiði, fyri at taka sær av sínum nærmastu.

Somuleiðis hava heimarøktirnar tað heldur ikki latt tá tær fara frá teimum, sum liggja hjálparleys.

Tí vil sambandsflokkur-in bjóða seg fram og vísa ábyrgd og virðing fyri okkara eldru og virka fyri atveita teimum tað tænastu, sum nú einaferð er best fyri hvønn einstakan, um tað so er í heiminum ella á stovni.

Veljarakanningin

Bárður Nielsen
løgtingsmaður og valevni Sambandsfloksin í Norðurstreymoy

Nýggjasta veljarakanningin, ið bleiv almannakunngjørd týsdagin, gevur Sambandsflokkinum 28,5 % av atkvøðunum, og sjálvt um hetta er nakað minni enn veljarakanningarnar í november og desember, má hetta sigast at verða rættuliga gott .

Vit fingu eitt gott val seinast og sær út til, at framgongdin heldur fram. Men eitt mugu vit gera okkum greitt, tað er, at ein veljarakanning ikki altíð gevur eina rættvísandi mynd av sjálvum valúrslitinum, her eru undanfarnu valini gott dømi um tað, har tað hevur víst seg at broytast rættiliga nógv, í mun til hvat allar veljarakanningar undan valinum vístu. Sum oftast eru tað teir flokkar, sum liggja væl fyri í eini veljarakanning, sum ganga aftur, og teir, sum ikki liggja so væl fyri, fáa fleiri atkvøður á sjálvum valinum.

Tí er tað av stórum týdningi, at sjálvt um vit nú liggja væl fyri í veljarakanningunum ikki taka okkum av løttum, men veruliga fara til verka og standa saman um at fáa enn fleiri veljarar til løgtingsvalið.

Sjálvandi hava valevnini høvuðsábyrgdina av, at fáa floksins boðskap út, men tað ger einki, um veljarar flokksins eisini hjálpa til og soleiðis fáa boðskapin út til so nógv sum gjørligt. Við vón um, at øll sambandsfólk verða væl nøgd eftir løgtingsvalið og at vit fáa ávirkan á politikkin komandi 4 árini.

Við vón um eitt gott sambandsval.

Nú heysta vit fullveldisfruktirnar

Annfinn Brekkstein
valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy

Í seks ár hevur fullveldissamgongan stýrt landi okkara, og hetta er úrslitið: Blokkurin er skorin við 366 milliónum krónum. Hvønn man tað fara at raka í samfelagnum, og kunnu vit vera blokkstuðulin fyriuttan?

Fíggjarætlanin fyri 2003 kemur allarhelst út við einum halli upp á umeið 250 milliónir krónur. Í hesi seks árini er inntøkan vaksin við einari millard. Men samstundis sum inntøkan er vaksin, hava vit havt galoperandi ótálmaðar útreiðslur í almenna sektorinum upp á yvir eina milliard krónur!

Og sum um tað ikki var nó mikið við tí, so hava vit fingið øktar ferðaseðlaprísir, samstundis sum vit hava staðið modell til eina ella tvær eykajáttanir til Strandferðsluna. Postverk Føroya hevur eisini havt brúk fyri eykajáttanum upp í 5-6 millónir krónur fyri at fáa endarnar at røkka saman.

Tað er sjálvsagt, at hesir stovnar skuldu verið lagdir saman og at vit áttu at privatiserað tann partin hjá báðum stovnum, sum hevur við flutning av farmi og pakkum at gera. Tað verður neyðugt í framtíðini at rationalisera og effektivisera almennar stovnar, so vit á tann hátt kunnu fáa ein effektivari og býligari rakstur.

Eitt annað er, at sjónvarpsgjaldið er hækkað við 500 krónum fyri hvørt sjónvarpið. Hetta er ein hækking upp á nærum 30 prosent - og hartil ein tilvildarlig hækking.

Somuleiðis er skattatrýstið hesi seinastu seks árini økt við 3 prosentum, og so ætlaði fullveldissamgongan enntá at halda fram við at skatta fólk. Fullveldissamgongan hevði eisini ætlanir um at fara eftir rentustuðlinum, hóast hetta hevði rakt barnafamiljurnar meinast. Avgjaldið á plastikkposar og sodavatn hevði rakt ávís vinnuvirki.

Hetta er at spæla hazard, tí talan er snøgt sagt um panikkskatt, sum vit kalla byrjan til fullveldisskatt. Hesin ørskapurin má steðgast, og tað verður best gjørt við at stuðla Sambandsflokkinum á løgtingsvalinum!

Miðnámsskúlin gevur møguleikar

Poul Erik Jacobsen
Valevni Tjóðveldisfloksins í Suðuroy

»Eingin er ov gamal at læra«, plagar at verða tikið til.

Hetta er so satt sum tað er sagt, og ongantíð so átrokandi sum í dag. Dagsins samfelag broytist og mennist skjótari og skjótari so krøvini til at fylgja við og ikki minst, at vera við at ávirka hvussu morgindagurin sær út, gerast torførari. Kravið er tí, at útbúgvingarstovnarnir í landinum eru á einum høgum støði, og at øllum stendur í boði at nema sær lærdóm.

Útbúgving og skúli hava altíð verið mál sum Tjóðveldisflokkurin metur at hava stóran týdning og sum flokkurin ofta hevur umsitið, tá ið hann hevur verið í samgongu.

Í hesum døgum verður miðnámsskúli bygdur í Vági og tað er ikki minst Tjóðveldisflokkinum fyri at takka. Hesin skúlin fer at betra um umstøðurnar hjá ungdóminum í Suðuroynni at nema sær miðnámsútbúgvingar, og longri tey ungu kunnu vera í oynni, størri er møguleikin fyri at fleiri av teimum koma aftur, tá tey hava verið úti í stóru verð og nomið sær útbúgving og kunnleika.

Eisini vil Tjóðveldisflokkurin virka fyri at øllum fakbólkum stendur í boði at koma á skeið, at dagføra sína vitan, í tann mun tað er neyðugt.

Hugsast kann at miðnámsskúlin, saman við øðrum skúlum í oynni, kunnu skapa og menna eitt umhvørvi, sum drgur fólk at sær at hvessa sær vitið, ikki bert ungdómurin í dagtímunum, men eisini tey tilkomnu um kvøldarnar.

Eitt mennandi skúlaumhvørvi hevur bestu korini við einum sterkum Tjóðveldisflokki.

Suðuroyingar, gloymi ikki at Tjóðveldisflokkurin fekk Suðuroynna upp í part aftur og fekk sín þart av landsins íløgum,ið gjørdar eru síðan 1998.

Veljið Tjóðveldisflokkin 20. januar.

X við E

Royndirnar at loysa úr lagdi

Lasse Klein
valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy

Í mínum huga er eingin ivi um, at áhugamálini hjá Føroyingum eru best vard við at velja ein sterkan Sjálvstýrisflokk á ting.

Politikkur skal helst ikki bert verða amboðið til at fáa síni egnu persónligu sjónarmið fram í ljósi.

Í einum felagsskapi

Politisku sjónarmiðini skulu eisini avspegla sjónarmiðini hjá veljaranum, tí einstaka borgaranum. Ein og hvør trívist best í einum felagsskapi har viðkomandi hevur møguleika fyri at verða hoyrdur.

Á val eiga vit at fara

Orsøkirnar eru mangar, men fyrst og fremst tí at neyðugt er at velja fólk, sum tora at arbeiða eftir sínari sannføring, og sum duga at síggja veruleikan í eyguni..

Føroyar eitt gott land

Føroyar er eitt gott land at búgva í. Tað náttúrugivna ríkidømi skulu vit umsita við skili og ikki køva tað í tráanini eftir lættvunnum profitti á fáar hendur. Heldur skulu vit royna at bera so í bandi, at øll hava møguleika til at vinna sær lív og tilveru burturúr landsins ríkidømi.

Úrslitini kunnu vit ávísa

Royndirnar at loysa úr lagdi hava vit. Úrslitini kunnu vit ávísa, men skal frælsyntar røddir framvegis ljóða á Føroya Løgtingi - er neyðugt at fara manssterk á val 20. januar, og seta X við lista D. Politikkur skal helst ikki bert verða amboðið til at fáa síni egnu persónligu sjónarmið fram í ljósi.

Í einum felagsskapi

Politisku sjónarmiðini skulu eisini avspegla sjónarmiðini hjá veljaranum, tí einstaka borgaranum. Ein og hvør trívist best í einum felagsskapi har viðkomandi hevur møguleika fyri at verða hoyrdur.

Á val eiga vit at fara

Orsøkirnar eru mangar, men fyrst og fremst tí at neyðugt er at velja fólk, sum tora at arbeiða eftir sínari sannføring, og sum duga at síggja veruleikan í eyguni..

Føroyar eitt gott land

Føroyar er eitt gott land at búgva í. Tað náttúrugivna ríkidømi skulu vit umsita við skili og ikki køva tað í tráanini eftir lættvunnum profitti á fáar hendur. Heldur skulu vit royna at bera so í bandi, at øll hava møguleika til at vinna sær lív og tilveru burturúr landsins ríkidømi.

Úrslitini kunnu vit ávísa

Royndirnar at loysa úr lagdi hava vit. Úrslitini kunnu vit ávísa, men skal frælsyntar røddir framvegis ljóða á Føroya Løgtingi - er neyðugt at fara manssterk á val 20. januar og seta X við lista D.

VALGREINAR

Tjóðpallur Føroya

Elin Lindenskov
valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy
www.lindenskov.com

Tað er av sera stórum týdningi fyri eitt hvørt samfelag, at listin og mentanin verður væl stuðla. Ætlanin var at Tjóðpallur Føroya skuldi alment setast á stovn 1. januar 2004. At løgtingið hevur samtykt lóg um Tjóðpall Føroya er eitt stórt mentanarligt framstig, hóast langt er eftir á mál, áðrenn vit hava eitt veruligt Tjóðleikarahús.

Vit kunna takka Grímu og fólkunum rundan um Grímu fyri at Tjóðpallurin nú er so nær. Hesi fólk hava stríðst síðani einaferð í 70'unum fyri at fáa eitt dygdargott yrkisligt leikumhvørvið. Ofta fyri lítla og onga løn.

Gríma hevur mangan verið nýskapandi. Tey hava framført og fingið gjørt leikir, sum viðgera nútímans føroyska samfelagið. Tey hava víst okkum altjóða leiklist. Tað er slíkt ein yrkisligur tjóðpallur kann gera fyri føroyska samfelagið. So kunna vit eisini á hesum øki, teljast millum hini norðurlondini.

Vilt tú vita meira, um hvat eg tikist við seinastu 4 árini, so vitja mína heimasíðu www.lindenskov.com . Har liggja hundrað tals greinar, røður o.a. frá hesum tíðarskeiði.

Fullveldisdreymurin ringasta marran

Heðin Mortensen
valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy

Eftir alt ov mong ár við politiskari oyðimarkargongd, tí landsins leiðsla stardi seg blinda upp á fullveldi, hevur Føroya fólk brúk fyri einum nýggjum tíðarskeiði, har vit lata svøvntunga frælsisdreymin liggja og hugsa um realpolitikk!

Rikin er hesin árini ein politikkur, ið hevur havt til endamáls at seta eina hugsjón oman fyri menniskjað, og slíkur politikkur kann bara vera deyðadømdur.

Sambandsflokkurin setir vælferðina hjá einstaka føroyinginum fremst og vil ongantíð lata hugsjónina taka valdið, so alt annað fer av kós.

Menniskjað má og skal vera tað, ið er miðdepilin í hesum samfelagnum, skal okkum vera lív lagað. Alt annað er ørskapur, og tað hava vit eisini fingið staðfest ferð eftir ferð hesi bæði samgonguskeiðini, ið farin eru.

Vilt tú hava Føroyar riknar við realpolitikki, er valdagurin 20. januar títt gylta høvi at gera tína ávirkan galdandi.

Gevur tú Sambandsflokkinum møguleikan, gevur tú eisini tær sjálvum møguleikan. Og tað er ikki annað, enn tú hevur uppiborið!

Góðan dag allir suðringar!

Nita Næs
valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy

At búgva í Suðuroy er gott. Suðuroyggin er ein perla fyri børn at vaksa upp í.

Tá Javnaðarflokkurin heitti á meg, um at stilla upp til løgtingsvalið, játtaði eg sjálvsagt. Javnaðarflokkurin tekur hugsjónarliga alt menniskjalívið við í sína politisku valskrá. Øll lívsskeiðini eiga at vera virð, sigur flokkurin.

Við einum Javnaðarflokkin í Tinganesi, koma verulig menniskjaviðir aftur á dagskránna, einvegis fullveldisgongdin verður hugsjónarliga breiðka við eini sjálvstýrisleið, menniskjaligar spekulatiónir verða steðgaðar, og heildarmyndin av samfelaginum verður aftur sett í eitt perspektiv. Hugsast skal um heila menniskja, og ikki sum nú í brotum.

Hvussu hjálpa vit t.d. einum heilaskaddum menniskja í Suðuroy, einum psykiskt sjúkum, einum innlæringsveikum, o.s.fv. Tað gera vit ikki við bert at flyta viðkomandi til Havnar.

Vit skulu skapa góð viðurskifti fyri okkum - sjúkum sum frískum - HER á oynni.

Tað alt avgerandi fyri Suðuroynna er, at løgtingsumboðini, sum vald verða vilja og tora at arbeiða saman, og tora at hugsa, at aðrir flokkar arbeiða fyri somu søk sum vit, nevniliga trivna í oynni.

Eitt løgtingsumboð í Suðuroy hevur sjálvandi, alt valdømi sum sítt arbeiðsøki. Hetta mugu suðuroyingar eisini sjálvsagt krevja. Landspolitikarin í Suðuroy, skal hugsa um oynna sum eina heild - ikki sum nú - sum norðaru og sunnaru helvt av oynni. Við hesum hevði fólk aftur fingið álit á politiska myndugleika, og oyggjarhugburðurin var mentur.

Tað er at fegnast um at seinasta samgonga avgjørdi at fáa nýggja Smyril bygdan. Avbjóðingin verður nú, ikki at reypa sær av, at nýggi Smyril er komin, avbjóðingin verður , hvussu brúka vit henda nýggja nalvastrong til restina av landinum, og til restina av heimunum.

Tað er ein sjálvfylgja, at politikarar hugsa um at útbyggja okkara veganet, okkara tunnlar, og aðrar fysiskar karmar. Men tað er eingin natúrlig avleiðing, at ein kvinna í Vági fær arbeiði aftur, tí vit hava fingið Smyril, ella at kvinnan í Hvalba fer at tívast betur í Hvalba, tí vit hava eina tvísporaða tunnel millum Tvøroyri og Hvalbiar. Her skal meira til, enn betong, asfalds politikkarar.

Ein kann undrast á, at hóast helvtin at suðringum eru kvinur, so er ta bert ein kvinna, ið hevur umboða Suðuroynna í einum stuttum tíðarskeiði á løgtingi. Hvussu ber hetta til? Eru kvinnurnar við bara sum pynt og ífylla á vallistunum? Ikki tí ein kvinna skal vera vald bara tí hon er ein kvinna, men vit vita, at har sum bæði kvinnur og menn eru við til at skapa gerandisdegin, skapa góðar karmar, har koma øll tey góðu menniskjansligu virðini til sín rætt.Og bara soleiðis kunnu vit fáa "Tað góða samfelagið".

Tað at feskfiskurin skal av oynni, hongur alla tíðina, sum ein háttan bæði fyri virki, stjóra og ikki minst flakakvinnur og flakamenn, tí tað førir óstoðugt arbeiði við sær.

Hví ikki ganga nýggjar leiðir, har fiksavøran vit framleiða, eisini gevur støðugar inntøku til flakafólk, og virki. Ein støðug inntøka merkir eitt betri samfelag, og fyri eitthvørt menniskja, er tað, tað allar týdningarmesta, at hava eitt arbeiði at fara upp til hvønn dag. Samlaða útreiðslurnar fyri eitt húsarhald, sum arbeiðir í fiskiídnaðinum á landi eru eins stórar í juni sum í januar.

Mítt lyfti til veljarin verður, at tað er mín skylda sum politikari, at hugsa um alla oynna, sum eina oyggj.

Bert saman binda vit oynna saman. Bert í felag fáa vit trivna í oynni.

Gott kvinnuval øll somul
Gott oyggjaval øll somul.
Gott javnaðarval øll somul.

Fær Eysturoyggin ein tingmann afturat?

Bill Justinussen
landsstýrismaður og valevni Miðfloksins í Eysturoy
Bill.teletech.fo

Seinastu árini hevur Eysturoyggin havt 6 tingfólk. 5 umdømisvald og eitt eykavalt. Møguleikin fyri einum eykavaldum afturat er størri nú enn áður. Miðflokkurin kjálkar uppat tveimum tingfólkum, og sambært nýggjastu veljarakanningini verður tað Eysturoyggin, sum fær annað. Tí eigur tú at hugsa teg um eina eyka ferð, áðrenn krossurin verður settur. TÍN atkvøða til Miðflokkin ger ikki, at stóru flokkarnir missa síni umdømisvaldu umboð, tí teirra støða er sera trygg. Men TÍN atkvøða kann sera sannlíkt gera, at Miðflokkurin fær ein tingmann í Eysturoynni.

Um tú tekur undir við, at samfelag okkara í framtíðini skal byggja á ta tryggu grund, sum undanfarnu ættarlið løgdu, so er Miðflokkurin eitt gott val. Vit taka ikki undir við at broyta samfelag okkara, bara tí nøkur av grannalondum okkara hava valt aðrar leiðir. Samfelag okkara skal framhaldandi byggja á kristna siðaarvin, tí eru vit eitt av heimsins bestu og ríkastu londum.

Vit hava eitt gott samfelag. Ríkt bæði í mentan, andslívi og materiellum tilfeingi.

- Bert 5% av heimsins íbúgvum eiga egið tak yvir høvdingð. Yvir 90% av føroyingum eiga sítt egna.
- Dagliga doyggja úti í heimi hundraðtals menniskju av hungursneyð og fátækradømi. Ongin føroyingur doyr av hungursneyð.
- Milliónir av børnum kring heimin duga ikki at lesa ella skriva. ØLL børn í Føroyum fáa útbúgving sum ein heilt náttúrligur partur av lívinum. Longri útbúgving, handliga sum bókliga, fáa øll, sum ynskja tað.
- Milliónir av menniskjum eru arbeiðsleys úti í heimi. Í fjør var arbeiðsloysið í Føroyum undir 2,5%, sum er lægri enn náttúrliga arbeiðsloysið, sum liggur um 3%.
- Enntá í Grønlandi, sum fær milliónir í stuðuli úr Danmark, fáa ikki øll neyðuga sjúkraviðgerð, eitt nú fyri krabba-mein. ALLIR føroyingar, sum hava tørv á sjúkraviðgerð, fáa hesa. Vit gera alt fyri at bjarga og betra um mannalívið, einstakar viðgerðir kunnu kosta 3 milliónir.

HETTA ERU FØROYAR, og soleiðis vilja vit framvegis, at Føroyar skulu vera.

Og Miðflokkurin vil framhaldandi arbeiða fyri at menna føroyska samfelagið. Familjupolitikkur er við Miðflokkinum komin á dagsskrá í føroyskum politikki. Allir flokkar tosa NÚ um familjupolitikk. Okkara familjupolitikkur er m.a.:

- Hjún skulu skattast við helvtarbýti
- Ansingarstuðulin skal fylgja barninum, og systkinaavsláttur skal veitast í dagstovnum
- Ongin skal aftra seg at giftast, tí tað kann verða ein fíggjarlig útreiðsla
- Einsamallar mammur (ella pápar) og einkjur (ella einkjumenn) skulu fáa meira forsorgarhjálp. Minsta upphædd fyri livistøði skal hækkast.

Einasti landsstýrismaður úr Eysturoynni hesuferð var úr Miðflokkinum. Hinir flokkarnir funnu ongan landsstýrismann í Eysturoynni, hóast hendan vinnulívsoyggin ber størsta partin av pengunum í landskassan. Eg havi vart áhugamál fyri Eysturoynna, tá høvi hevur verið til tess, tó uttan at rópa upp um tað.

Miðflokkurin satsar upp á Eysturoynna, um tú satsar upp á Miðflokkin.

Ger valdagin 20. januar til ein H-dag.